Bókmentir
Ummæli

Ein nýggj tøgn frá Tóroddi Poulsen

Kinna Poulsen

Leyvið haldi eg - Løvet tror jeg er sermerkta heitið á einum nýggjum tvímæltum føroyskum/donskum yrkingarsavni hjá Tóroddi Poulsen, sum danska forlagið After Hand gav út. Hetta er fimta útgávan hjá honum á danska forlagnum, og hesa ferð hevur hann sjálvur enduryrkt yrkingarnar á donskum. Lætta, óavgjørda orðingin Leyvið haldi eg stavar frá hesari elegantu, ljósflykrandi yrkingini á síðu 54:

leyvið haldi eg,
drekkur myrkrið við máta

tey blettutu skýggini
argaðu eygu míni

vindeygað er vaskað
við deyðum flugum

eg liggi her
og trúgvi á skugga Guðs

tað tysta ljósið
setir seg sjálvt í hálsin

Innganguri letur okkum skilja, at yrkjaraegið hevur tørv á at læra seg eina nýggja tøgn fyri at samskifta við trøini eins væl og yrkjaraegið plagdi at samskifta við steinarnar. Temaið ber sostatt við tað tvímælta, við føroyska upprunan og danska gerandisdagin hjá yrkjaranum og myndlistamanninum, sum hevur búð niðri í skjótt 20 ár. men sum áhaldin hjúklar um føroyska málið bæði í yrkingum og myndum. Tað er í ár júst 30 ár síðan, Tóroddur Poulsen gav út sítt fyrsta yrkingarsavn, Botnfall og hesi árini er minst ein bók komin frá honum um árið. Hansara, yrkinga- og træprentsmyndasavn Fjalir er føroyska uppskotið til Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins, hon er týdd til danskt og eitur Planker. Onkur vil vera við, at Tóroddur Poulsen er broyttur munandi, eg haldi hin vegin, at tað er hugtakandi og sermerkt hvussu homogent yrkjarauniversið hjá Tóroddi Poulsen er frá byrjanini og fram til í dag. Reglurnar eru styttri, yrkingarnar eru meira komprimeraðar, men yrkihátturin er enn grundleggjandi tann sami modernistiski við negatiónum, spontanum subjektskiftum, løgnum samansetingum av logiskt óforeiniligum heildum og samansetingum av ítøkiligum og óítøkiligum, umframt, at ókendir lutir verða umrøddir sum um vit kenna teir. Eisini innihaldsliga er talan um eitt serstakt og støðugt univers við klettum, trøum, vindi, myndum, dreymum og skýggjum, sum bera seg øðrvísi at enn tey plaga úti í veruleikanum. Sigast skal, at umhvørvið í yrkingunum er vorðið alsamt meira abstrakt í yrkingunum. Surrealistiska, dreymakenda flogið er sannførandi og originalt í teimum fjøruti yrkingunum í nýggja savninum. Reglurnar eru stuttar og konsentreraðar. Abstraktiónin forðar í ein vissan mun fyri eini realistiskari, mimetiskari tulking av yrkingunum, men millum tær abstraktu reglurnar hóma vit allíkavæl eitt einsamalt yrkjaraeg í tvídrátti, sum mistrívist í stórbýarferðini, men sum sanniliga eisini kann hava friðsælar løtur millum trøini, har hann prátar við súkkluna:

havi jagstrað kettur
úr garðinum
og givið fuglunum
so teir afturfyri
syngja fyri mær

havi klipt runnin
hentað súrepli
við maðkum í
og sagt
við súkkluna
at hon ikki skal rusta

og eg havi eisini sæð
gamlar sangir
undir væðingini
lata kuffertið upp
so ein søga av dusti
dansaði fyri ljósinum
so tað smakkaði
av gyltum myrkri

Myrkrið er gylt og brotið, náttin er doyvd, áin er dovin, summarið er ævig nátt og mjørkin fæst í spannum í hesum assosiatiónselvandi yrkingunum, sum eru fullar av samanhangi og av mótsetningum og øvugtleika og sum eru orðaðar og settar saman soleiðis, at lesarin í heilum kemur í tankar um myndlist, um installatiónir ella um onkran málning hjá Soulages - tað var jú hann, sum fekk lýsandi ljósglottar burtur úr kolasvørtum málingastrokum, tað sama ger Tóroddur Poulsen her: náttin er/ so ljós/ trúgvi ikki/ á myrkrið longur/ /Guð/ hevur tú/ eisini/ í hjartanum/ tá maðkarnir/ hava etið teg/ og summarið/ er ævig nátt.

»Blunda og tú sært míni orð« stóð í einari av hansara yrkingum (Myrkaspæl), og nú hava vit fingið eina nýggja tøgn at lesa frá yrkjaranum og listamanninum, hann er framleiðslufúsur og alt annað enn tigandi. Gjøgnum assosiatiónir og mál transformerar hann vanligar gerandisupplivingar til list, t.d. verður ein kaffimunnur ella fyrireikingarnar, tá gravað verður eftir kaffi, atvoldin til tankar um at verða uppafturgrivin og tað hevur ein egnan logiskan samanhang, sum hevur við brúna litin og graving at gera.

tey grava og grava
og finna eina lítla skeið
og tey grava
meira og meira
grava tey
og finna eina skál
og aftur grava tey
og grava og grava
og finna ein kopp
og til síðst finna tey meg
sum ikki brúkar sukur í kaffi

- - -

eitt petti av tí brotna myrkrinum
sveimar eina løtu í luftini

áðrenn tað dettur niður
í tann gráa kavan

beint har sum óttin undir leyvinum
plagdi at fáa alt við
ti heystið fór undir
at siga frá teirri heilt stóru søguni

um alt sum henda skuldi